# Norðbúgvin bleiv nummar eitt

**Tað var ein søguligt løta tá í Norðbúgvin bleiv fyrsta skipið, sum er skrásett í skipasýninum, eftir at tað var yvirtikið á føroyskar hendur**

SKIPARAKSTUR
*Áki Bertholdsen*



*Her liggur Norðbúgvin og avreiðir í Hanstholm av fyrsta túrinum. Skipið aftanfyri, er Suðurvarði, sum Bjarti Mohr eisini er ein høvuðsmaður í. Suðurvarði hevði 300 tons av nebbasild*

– Nóta- og trolskipið, Norðbúgvin er nú blivið søguligt í Føroyum.

Tað er er nevniliga fyrsta skipið, sum er skrásett í skipasýninum, eftir at tað var yvirtikið á føroyskar hendur.

Nú føroyingar hava yvirtikið Skipasýnið, skulu øll skip sum koma inn í føroyska skipaflotan góðkennast av føroyska skipasýninum.

Higartil hava danir umsitið hetta málsøki ígjøgnum eina umboðsstovu í Føroyum.

Og fyrsta skipið, sum er innflutt og skrásett í Skipasýni Føroya, er Norðbúgvin úr Havn. Norðbúgvin kom úr Skotlandi fyrst í mars mánað. Tað er dóttirfelagið hjá Kongshavnar Trolarafelag, P/F Rættarhamar, á Strondum, sum hevur keypt skipið.

Bjarti Mohr, sum er útgerðarmaður á Norðbúgvanum, sigur, at talan er eitt kombinerað nóta- og trolskip og hann skal fiska í Norðsjónum eftir ídnaðarfiski.

Norðbúgvin er upprunaliga norskur og var navngivin " Borgoygut". Síðani keyptu skottar hann og góvu honum navnið "Philorth", eftir eini á við Fraserburgh.

Norðbúgvin hevur tikið mangan brattan og var m.a. við í bjargingararbeiðinum táið hitt stóra oljutangaskipið fór á land í Hetlandi fyri nøkrum árum síðani.

Norðbúgvin er 55 metrar langur og 10,2 metrar breiður og lastar upp til 1000 tons. Skipið hevur ligið við bryggju undir Skipasmiðjuni í Havn til umbyggingar í meira enn tveir mánaðir.

Bjarti Mohr sigur, at meginparturin av skipinum er tikið sundur og umbygt so at tað lýkur øll krøv frá Skipasýninum. So hóast skipið er bygt í 1975, er tað í góðum standi nú. Hvat tað annars stendur teimum í nú, hevur hann ikki hug at tosa um.

## Ógvuliga gjøgnumført

Bjarti Mohr útgerðarmaður á Norðbúgvanum sigur at Føroyska Skipasýnið var ógvuliga gjøgnumført.

– Eitt nýtt krav sum er komið, er at øll skip skulu vera í klassa. Tískil er alt á Norðbúgvanum, ið hevur við klassakrøvini at gera, eisini gjøgnumgingið.

Norðbúgvin er klassaður hjá Det Norske Veritas sum man vera ímillum tey strangastu klassfyritøknum í heiminum.

Tað vóru annars summi, sum stúrdu fyri at trygdarkrøvini fóru at verða slakað, tá ið vit sjálvi skuldi umsita skipasýnið.Men tað er heldur tvørturímóti, sigur Bjarti Mohr.

– Men hóast tað kostaði nógv at fáa alt gjørt, sum kravdist, er tað kortini gott at fáa øll viðurskifti uppá pláss, serliga tey viðurskifti sum hava við trygdina at gera. Og at skipini skulu vera í klassa hevur stóran týdning, tí tá er fast eftirlit við skipunum. Tað kostar nógvan pening, men ger samstundis, at skipini eru nógv meiri verd, so tað hevur stóran týdning fyri flotan.

## Sera væl nøgdir

Hann sigur, at teir eru væl nøgdir við bátin. Hann var sjálvur við í Skotlandi eftir honum og hann royndist sera væl á heimferðini til Føroya.

Nú er Norðbúgvin júst afturkomin av fyrsta túrinum eftir nebbasild. Hann var í Hanstholm, har hann avreiddi 700 tons av nebbasild, sum hann fekk á hesum royndartúrinum.

Bjarti Mohr sigur, at eitt sindur av byrjunartrupulleikum vóru. M.a. bleiv trolið skeivt, av tí at ov nógv kom í beinavegin.

– Við tað at trolið er nýtt, høvdu knútarnir í meskunum ikki reiðiliga sett seg og tí bleiv trolið skeivt, táið skipið vendi á tóvinum, men hetta er nú gjørt aftur.

Annars brúka teir hesar nýggju lemmarnar frá trolvirkinum í Vági.

Reiðarin sigur frá manningini, at teir eru sera væl nøgdur við lemmarnar, tí teir ganga væl í sjónum og rigga eisini sera væl til hetta brúkið.

Bjarti Mohr sigur at manningin letur sera væl at skipinum. Teir siga, at hann tóvar væl og liggur væl í sjónum. Skipari á Norðbúgvanum er Kári Petersen av Skarvanesi, annars er manningini er úr Skopun og úr Havn.

# Nú var neyðugt at seta ferðina niður

**– Vit kunnu ikki koyra so skjótt at tann seinasti ikki eisini fær fylgt við, sigur Kári Højgaard, formaður í sjálvstýrisflokkinum**

NýGGJ SAMGONGA
*Áki Bertholdsen*



*– Hetta var ein tungur burður, men úrslitið er til at fegnast um, sigur Kári Højgaard, formaður í sjálvstýrisflokkinum*

– Tey næstu fýra árini skal onki skrumblast ígjøgnum.

Kári Højgaard, formaður í sjálvstýrisflokkinum, er væl nøgdur við samgonguskjalið, sum nú er gjørt við fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og miðflokkin um nýggja smgongu.

Hann sigur, at eftir samgonguskjalinum hevur sjálvstýrisflokkurin fingið fulla trygd fyri tí, sum flokkurin stendur fyri, nevniliga eini hóvligari og tryggari tilgongd, har vit stig fyri stig ganga fram ímóti størri sjálvbjargni.

Hann er sostatt ikki heilt samdur við Høgna Hoydal, formanni tjóðveldisfloksins, sum sigur, at hendan samgongan hevur beina kós fram ímóti fullveldinum.

– Eg leggi ikki so nógv í orðið fullveldið. Vit hava gjørt eitt samgonguskjal, sum fevnir um fýra ár og í tí samgonguskjalinum, hava vit avtalað at taka nøkur smærri stig á sjálvstýrisleið. Meiri enn tað liggur ikki í samgonguskjalinum og tað fara vit í sjálvstýrisflokkinum at halda okkum. Og tað væntar hann eisini, at hinir flokkarnir fara at halda seg til.

– Tað, sum hevur størstan týdning fyri okkum, er, at vit gerast meiri sjálvbjargin, men at tað verður gjørd soleiðis, at føroya fólk kenna seg fullkomiliga trygg við gongdina.

Kári Højgaard sigur, at tað er júst hetta, sum er avtalað í nýggja samgonguskjalinum og meiri enn tað leggur hann ikki í avtaluna ímillum teir fýra flokkarnar. Og hann tulkar heldur ikki samgonguskjalið øðrvísi enn tað, sum skrivað stendur.

## Ógvuliga hóvligt

Hann sigur, at í samgonguskjalinum hava vit avtalað nakrar yvirtøkur. Men tað hevur avgerandi týdning, at tað stendur eisini í samgonguskjalinum, at allar yvirtøkur verða neyvt fyrireikaðar í samskifti við allar avvarðandi partar og neyvar umsitingar- og fíggjarætlanir gjørdar og lagdar fyri løgtingið, áðrenn yvirtøkan verður framd.

Hann heldur, at hetta tryggjar, at tað, sum verður gjørt, verður gjørt við skili.

Tað, at samgonguskjalið er so hóvligt, tryggjar eisini, at tað hevur undirtøku í einum nógv størri parti av Føroya fólki og Føroya Løgtingið, enn undanfarna samgongu hevði.

– Viðmerkingarnar frá andstøðuni til samgonguskjalið benda eisini á, at tað er vón fyri undirtøku frá einum stórum parti í Løgtinginum fyri politikkinum á ríkisrættarliga økinum.

Men hann er sannførdur um, at tað fer ikki at steðga øllum stigum á sjálvstýrisleið, at yvirtøkurnar skulu gerast í samstarvi við avvarðandi partar í málinum.

– Tað munnu vera ómetaliga fá, sum hava nakað ímóti at verða yvirtikin. Tað, sum prestar og politistar og onnur hava verið ótrygg við, er, at tey hava følt, at yvirtøkurnar verða skrumblaðar ígjøgnum. Og tað er væl skiljandi at tey eru ótrygg við slíkar broytingar, sum ávirka teirra viðurskifti so grundleggjandi. Men verða allir partar væl kunnaðir og sleppa tey at vera við til at forma sína egnu framtíð, og kunnu vit veita teimum vissu fyri, at tey ikki vera verri fyri, tá ið tey eru yvirtikin, verða tey av sær sjálvum positiv.

Kári Højgaard ivast onga løtu í, at landsstýrið fer at liva upp til orðingarnar í samgonguskjalinum í so máta, so at yvirtøkurnar fáa undirtøku hjá teimum, sum tær fevna um.

– Ger Landsstýrið tað, kann eg ikki hugsa mær, at nakar fer at hava nakað ímóti at verða yvirtikin.

Hann sigur, at fyri sjálvstýrisflokkin hevur tað ikki so stóran týdning, at tað ikki gongur so skjótt. – – Fyri okkum hevur tað týdning, at gongdin er trygg, so at vit fáa fólkið við, sigur Kári Højgaard.

Hann sigur, at tí er tað eisini eitt høvuðsendamál í hesi samgonguni, at kjølfesta tey stóru stig, sum eru tikin á sjálvstýrisleið í farna valskeiði.

– Skulu vit varðveita vælferðina, er tað neyugt, at vit nú seta ferðina niður og laga samfelagið til niðurskurðin í blokkinum og onnur tiltøk, sum eru gjørd, áðrenn vit fara víðari, leggur hann afturat.

## Fleiri málsøki

Annars fegnast formaður sjálvstýrisfloksins um, at tað eisini eydnaðist sjálvstýrisflokkinum at fáa nøkur málsøki afturat at umsita í nýggju samgonguni.

Umframt oljumál, hava vit nú eisini orkumál, byggi- og býarskipanarmál og, ikki minst útjaðaramál.



# Leitar eftir vinfólki frá krígnum

**David McDine, sonur bretska hermannin, Joseph McDine, sum var í Føroyum undir seinna heimsbardaga, leitar eftir vinfólki, pápin fann sær á Toftum ella á Nesi undir krígnum. Hann hevur eingi nøvn at halda seg til, bara eitt postkort og nakrar myndir**

EFTIRLÝSING
*Eirikur Lindenskov*



*Føroyska familjan á Nesi í Eysturoy, sum var so blíð við pápa mín, ta tíð hann var her undir krígnum*



*Pápi mín við føroyskum vinum – kanska myndin er tikin á Toftum*

– Eg eiti David McDine, eri blaðstjóri á einum vikublað, eri 64 ára gamal, giftur og havi tvey vaksin børn.

Soleiðis byrjar ein onglendingur brævið, sum hann hevur sent føroysku bløðunum. Undir krígnum var pápi hansara í Føroyum. Hann doyði fyri 16 árum síðani, 80 ára gamal. Navn hansara var Joseph McDine, og hann var í tænastu hjá Royal Artillery í Føroyum árini 1942/43.

– Hann tosaði altíð um ta góðu tíðina, hann hevði í Føroyum og um vinfólkini, hann fann sær. Hann hevði samband við tey í nøkur ár, og eg havi eitt postkort, sum hann fekk í 1965. Eg havi eisini myndaalbum hansara við myndum úr Føroyum, serliga við myndum av familjuni, hann knýtti serligt vinarband við, skrivar David McDine, sum harmast um, at hann ikki veit navnið á familjuni og tískil heldur ikki hevur adressu teirra.

– Einasta sporið eg havi, eru hesar myndirnar og postkortið, eg sendi tykkum, skrivar hann.

Pápi hansara helt til á Nesi í Eysturoy, ta tíð, hann var í Føroyum.

David McDine kemur til Føroya at ferðast í summar saman við einum vinmanni. Hann kemur higar 5. juli og steðgar til 7. juli. Hann býr á Hotel Hafnia í Havn, meðan hann er her.

– Eg hevði verið sera fegin, um eg kundi hitt onkran í familjuni, sum var so blíð við pápa mín undir krígnum, sigur hann. Hann hittist á Hotel Hafnia, meðan hann er her. Til ber eisini at skriva honum bræv ella teldubræv. Bústaður hansara er: David McDine, Mount Ephraim, Wheelbarrow Town, Stelling Minnis, Canterbury, Kent, England.

Teldupostur hansara er: david@mcdine.fsnet.co.uk




*Baksíðan á postkortinum, sum pápi mín fekk úr Føroyum í 1965*



*Pápi mín, Joseph McDine í hermannabúnaum tíðliga undir seinna heimsbardaga*

19. Jazzfestivalurin:

# Stig Rossen høvuðsnavn

**Dagarnar 2. til 6. juli verður tann 19. Jazzfestivalurin hildin. 80 tónleikarar fara at spæla á 10 ymsum spælistøðum. Fleiri rættiliga kend nøvn leggja eisini leiðina til Føroya – Stig Rossen verður høvuðsnavnið**

FESTIVALUR
*Heri á Rógvi*

Aftur í ár verður skipað fyri Jazzfestivalinum. Hesin í Føroyum so kendi festivalurin fer fyri 19. ferð av bakkastokki, og fyrireikararnir hava eydnast at fingið hendur á einari røð av kendum jazz nøvnum – bæði innan- og uttanlands.

18 orkestur skulu dagarnar frá týsdegnum 2. juli til sunnudagin 6. juli spæla á festivalinum. Spælistøðini eru mest í Havn. Talan verður bæði um vanligar konsertir, men eisini ókeypis uttandura konsertir.

Brandur Øssursson, sum aftur í ár fyriskipar festivalin, sigur, at teir hesaferð hava lagt seg eftir at kunna vísa nógvan ymiskan sang. Ikki færri enn sjey kvinnuligir sangarar koma til Føroya til festivalin.

Nevnast kann eitt nú Irina Strange úr Russlandi. Hennera sangevni eru heilt framúr. Rødd hennara spennir um fýra oktavar í hennara jazzframførslu.

Eisini kunnu vit nevna Wentus Blues Band, sum er heimsken blues orkestur, sum fyrireikarin veruliga er glaður fyri at hava fingið til Føroya, tí eftirspurningurin er risastórur.

Sum heild umfatar Jazzfestivalurin rættiliga nógv forkunnugt og spennandi. Sum altíð er nógv føroyskt við. Eitt nú Malan Thomsen og Unn Patursson vera við við teirra manningum. Eisini veðrur okkurt tiltak við Norðlýsinum.

## Stig

Størsta navnið á festivalinum er Stig Rossen. Hann fer at hava tvær konsertir í Norðurlandahúsinum mikukvøldið.

Nítiárini vóru júst byrjaði, tá Stig Rossen heldur óvæntað fekk sítt stóra gjøgnumbrot í London sum musicalsangari. Hann var júst liðugur við sjónleikaraútbúgvingina á Guildhall School of Music and Drama, og hevði fingið ein tjans sum kórsangari í Les Miserables. Men har royndist hann somikið væl, at fyriskipararnir skjótt bjóðaðu honum høvuðsleiklutin sum Jeal Valjean í Les Miserables. Hetta var ein dreyma-leiklutur, og í honum varð Stig Rossen verandi í 1400 framførslum í sjey londum.

Í Føroyum fer Stig Rossen einamest at syngja løg úr sangleikum. Umframt Les Miserables, hevur hann til dømis havt leiklutir sum Judas í Jesus Christ Superstar, og Anatoly Sergievsky í Chess. Í Danmark var Stig Rossen eisini ein av fyriskiparunum av Chess, og tilsamans vóru 80.000 atgongumerki seld.

Haravtrat hevur Stig Rossen sungið nógvan musicaltónleik í konserthøpi. Til dømis tríggjar konsertir við Andrew Lloyd-Webber tónleiki saman við Radioundirhaldsorkestrinum. Og hann hevur bæði gjørt upptøkur og spælt konsertir við Sønderjyllands Symfoniorkester, undir leiðslu av bretanum David Firman

Men føroyingar kunnu eisini vænta at hoyra vælkendan populertónleik. Stig Rossen hevur nomið við nógv tónleikasløg. Hann er ein persónur, sum uttan íhald søkir sær avbjóðingar. Men hann kann í øllum førum lova, at tað bara verður tað besta, sum vit fáa at hoyra.

Tað var heppið hjá Jazzfestivalinum, at gera sáttmála við Stig Rossen um tvær konsertir í Norðurlandahúsinum 3. juli, upplýsir festivalstjórin Brandur Øssursson. Rossen er sera nógv umbiðin. Umframt at syngja konsertir, ger hann nógvar upptøkur, og leggur lag á hjá øðrum.

Stig Rossen er musicalmeistarin. Og hóast hann leingi hevur verið sera sjónligur í donskum høpi, hevur hann flestu árini havt støð í musical-umhvørvinum í London, har stórur partur av hansara danska tilfari eisini er lagt til rættis ella tikið upp. Eitt nú bróðurparturin av donsku Chess útgávuni, sum varð gjørd fyri hálvum ári síðan.

Men hann hevur eisini gjørt fløgur, sum eru ætlaðar altjóða marknaðinum. Eitt nú varð plátan Letters of Love frá 1997, sum Polygram gav út, seld nógv úti í víðu verð. Seinastu altjóða royndina hevur Stig Rossen úr Kina. Í samband við at tað í ár eru 50 ár síðan, at Danmark og Kina knýttu diplomatiskt samband, sang Stig Rossen í apríl mánaði í ár Gallakonsert í Beijing.

Atgongumerkjasølan til Stig Rossen er longu byrjað í Norðurlandahúsinum. Mánadagin í komandi viku byrjar atgongumerkjasølan til øll hini tiltøkini.